# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Bjarni Jøkladal 80 ár



Týsdagin 17. oktober fyllir Bjarni Ólav Jøkladal, búsitandi í Hoyvík, 80 ár. Bjarni er mest kendur frá Essostøðini, seinni Statoilstøðini í Kollafjarðardali, har hann rak sína egnu fyritøku ígjøgnum tríati ár. Mong munnu minnast aftur á staðið, har beinasemi varð víst og hjálp, tá ið ástøð, annaðhvørt tú ein summardag vart uppsteðgaður fyri brennievni, ella tú á vetrardegi ikki vanst vegin víðari í eini kavaódn.

Bjarni er fuglfirðingur, føddur á Tvøroyri. Foreldur hansara vóru Maria, fødd Høgnesen, ættað úr Oyndarfirði, og Óli Jøkladal, vanliga róptur Óli á Lakjuni, sum var ættaður úr Fuglafirði. Bjarni er elstur av seks systkjum.

Eftir barnaskúlan í Fuglafirði varð farið í holt við at læra á Tórshavnar Skipasmiðju og hildið fram við lær-uni á Blikksmiðjuni hjá Kjølbro á Fornagørðum í Klaksvík, har morbróðir hansara Erling Høgnesen var leiðari. Eftir lokna útbúgving og motor- og maskinpassaraprøvan í Havnini seinast í fjørutiárunum fór Bjarni til skips sum 2. meistari við skonnartini "Hjørdis", sum júst hevði fingið nýggjan B.&W. motor ísettan. Eftir hetta var hann 2. meistari við trolaranum Krosssteini. Nú bar leiðin so aftur til Klaksvíkar, har maskinistskúlin varð á dagsskránni fyrst í fimmtiárunum.

Næstu tíggju árini var Bjarni síðan á sjónum, fyrst sum maskinmeistari nøkur ár við hvalabátinum Sirru í miðjuni av fimmtiárunum, síðan við trolarunum hjá Kjølbro Jóannes Paturssyni – Bóndanum – og fyrst í sekstiárunum við Sjúrðarbergi, til hann legðist upp á land. Mangan hevur Bjarni sagt frá minniliga túrinum við Sirru, tá ið teir fingu ein bláhval – einasti bláhvalur, ið varð fingin tey árini. Bjarni stóð sjálvur við spælið hesa spennandi løtu.

Bjarni tók nú við leiðarastarvinum á Blikksmiðjuni hjá Kjølbro á Fornagørðum í Klaksvík, har hann mong ár frammanundan hevði starvast. Starvið røkti hann til lítar, inntil hann flutti í Kollafjarðardal í 1968.

Bjarni hevur verið virkin í samkomulívinum innan brøðrasamkomuna, og hevur hann tey seinnu árini verið við til at mynda leiðsluna av samkomuni Zion í Kollafirði. Eisini hevur hann verið virkin innan Kristniboðssambandið, har hann eitt skifti sat sum nevndarlimur.

Bjarni er ættkærur maður og hevur fingist nógv við ættargransking. Hann hevur øll árini, síðan hann gavst at sigla, havt bát, og hevur hetta verið hansara høvuðsítriv, tá ið ein løta beyðst. Bjarni er, hóast høvuðsyrkið er lagt á hillina, léttur á fótum og er fúsur til verka at taka eina hond í, har á stendur. Ja, hann kann í so máta gera nógvum ungum monnum til skammar við sínum áræði og virkisfýsni. Optimismuna kanst tú ikki taka frá honum.

Bjarni giftist í 1952 við Torbjørg Maritu, fødd Jacobsen - seinni á Bergi, ættað úr Klaksvík. Foreldur hennara vóru Elisabet, rópt Betta, fødd Mikkelsen, ættað úr Syðrugøtu, og Sámal á Bergi, vanliga nevndur Sámal hjá Antinesi. Bjarni og Torbjørg eiga tveir synir: Ólavur og Bjarti. Ólavur býr í Hoyvík, og Bjarti býr í Kollafirði.

Føðingardagurin verður hildin frá klokkan 12 í heimi teirra í Torkilsgøtu 3.

**Árni**

†

### Andlát og jarðarferðir

**Poula Olivia Danielsen, Leirvík**, ættað úr **Nólsoy**, andaðist sunnudagin 15. oktober, 86 ára gomul. Kistan fer av Giljagarði í Leirvíkar kirkju í kvøld kl. 18.30. Jarðarferðin verður úr kirkjuni mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Oliviu, kunnu lata eina peningagávu til herbergið hjá Frelsunarherinum í Havn.

**Kaj Thomassen, í Hoyvík**, andaðist leygardagin, 35 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Sonja Stangeland, fødd Kjelnæs, Klaksvík**, andaðist á Hauelang Sjúkrahúsi í Bergen frggja-morgunin 13. oktober, 75 ára gomul.

**Dagurin í morgin**
**17. oktober. Florentinus**, deyður umleið 1525. Biskupur í Orange í Fraklandi. Kendur úr søguni av fleiri kirkjufundum, har hann hevur verið við, men annars vita teir einki um hann at siga. Mikkjal á Ryggi varð føddur hendan dagin í 1879.

## »M.C. á ferð«

**Í Lindini týsdagin kl. 13.10**

Nú vertarskráin er komin á breddan, eru ferðafrásagnirnar hjá M.C. Restorff úr Grønlandi aftur á skránni. Hin fyrrverandi hotelverturin dugir til annað enn at borðreiða mat fyri fólki, og mong eru tey, sum meira ella minni regluliga hava lagt oyru til umrøðuevnini úr útnorði.



*Fyrsti skúladagur er ein hátíðardagur í Grønlandi*

### Helt 55 ára føðingardag í Nuuk

»Afturkomin til Sisimiut eftir trúboðanarferðina við Juvel, lat frúan meg vita, at hon hevði bílagt kahútt umborð á strandfaraskipinum Saffik Ittuk. Eg gjørdist bæði glaður og bilsin at hon soleiðis hevði fyriskipað eina mini feriu á hotelli í høvuðstaðnum í sambandi við 55 ára føðingardagin hjá mær hin 4. august«, sigur M.C.

»Útferðin kemur so sanniliga eisini lurtarum hjá Lindini til góðar, nú heimildir av øllum møguligum slag fara at verða at verða bornar frá ferðini í Miðgrønlandi hesar fyrstu mongu komandi vikurnar«, leggur hann afturat.

### Tilfarið trýtur ikki

Enn er hópin av tilfari til at taka frá sumrinum 2005.

»Ikki smávegis upplivingar og siðsøguligt tilfeingi liggur bara og bíðar eftir at verða redigerað. Síðani verður tað tvinnað saman við sangi og hóskandi tónum í nakrar knappan tíma drúgvar sendingar.

Haldi meg bara til sama leist, sum higartil. Tað er líkasum komið í blóðið«, leggur M.C. skemtandi afturat.

### Jólakrás

Upptøkur frá í summar, verða sendar í desember. M.C. helt tað vera spennandi at gera hesar upptøkurnar júst 1 ár eftir tær fyrstu.

»Nú bar til at fylgja upp uppá hetta og hitt. Hvat varð av honum og henni o.s fr.«, sigur M.C. at enda.



*Børnini í 3a í Tvøroyrar skúla vitja í Miðlahúsinum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Vitjan av 3a í Tvøroyrar skúla

Hósdagin 12. oktober høvdu vit í Miðlahúsinum vitjan av 3a í Tvøroyrar skúla.

Børnini komu til Havnar um morgunin og fóru suður aftur sama dag. Tey vitjaðu heystfagnaðin á Náttúrugripasavninum, svumu í Svimjihøllini í Gundadali og hugdu at djóragarðinum hjá Peturi Nolsøe á Ternuryggi. Síðan vitjaðu tey í Miðlahúsinum, og sóu hvat húsið verður nýtt til.

Tað var foreldrabólkurin í flokkinum, sum skipaði fyri túrinum, og fleiri av foreldrunum vóru við.